# Leiðin er løgd – men hon verður grýtut

**– Enn eru nógvar forðingar, sum skulu ruddast av vegnum fram ímóti toppfundinum í Keypmannahavn í 2009. Okkara ørindi vóru at fáa eina fasta tilgongd og eina dagfesting, og tað hava vit fingið, sigur danski umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard, sum hevur gjørt sær greitt, at áhugamálini verða framvegis líka ymisk í 2009 sum á Bali**

VEÐURLAGS-BROYTINGAR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*




*Uttan fyri fundarhølið kravdu fólk, at londini máttu semjast um at bjarga veðurlagnum (Mynd: Polfoto)*

– Eg haldi, at vit eru komin langt, segði amerikanski samráðingarleiðarin Paula Dobriansky, tá hon vegna amerikonsku sendinevndina takkaði luttakarunum á Bali. Og so kundi fundarstjórin, indonesiski umhvørvismálaráðharrin Rachmat Witoelar, duka í fundarborðið fyri seinastu ferð, meðan lógvabrestirnir frá fundarfólkinum fyltu tað stóra hølið.

Paula Dobriansky var ivaleyst væl nøgd við tað, sum var komið burturúr, men umboðini hjá ES-londunum, Noregi og einstøkum øðrum londum vóru ikki nøgd. Tí semjan var als ikki tað, tey vóru komin eftir.

– Vit og hini ES-londini høvdu sett okkum sum mál at fáa nakrar neyvar ásetingar um CO2-útlát inn í semjuna, men amerikanska mótstøðan gjørdi, at vit máttu ganga við til at sleppa tí, segði danski umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard.

## Gagnlig hóast alt

Umhvørvisverndarfelagsskapirnir vóru væl umboðaðir á Bali, og hóast ráðstevnan noyddist at slaka fyri amerikanska trýstinum og tí noyddist at sleppa øllum bindandi ásetingum, vóru tey flestu umhvørvisfólkini samd um, at ráðstevnan hevði verið gagnlig.

Eitt nú varð víst á, at í fleiri ár hava Kina, India, Brasil og nógv fátæk lond lagt forðingar í vegin, men at á Bali vóru hesi londini medvirkandi til, at tað yvirhøvur bar til at fáa eina semju.

– Tað vóru ES og menningarlondini, sum bjargaðu neyðsemjuni á Bali. Tað var tað mest gleðiliga, sum yvirhøvur hendi hesar dagarnar, og so sóu vit, at USA kundi ikki standa ímóti áhaldandi trýstinum frá teimum ríku og teimum fátæku londunum, segði aðalskrivarin í Heimsnáttúrugrunninum, Rasmus Hansson.

## Semjan

Semjan á Bali stingur út í kortið, skulu farast skal fram tey bæði næstu árini, til londini hittast aftur í desember í 2009 at taka samanum og at skriva undir eina nýggja avtalu, sum skal koma ístaðin fyri verandi Kyoto-avtaluna.

Avtalað er, at londini skulu halda fýra fundir ella ráðstevnur næsta ár. Tann fyrsta verður í mars, so verður aftur ein í juni, tann triðja verður í august og tann seinasta í desembur.

Herumframt hava londini avtalað samstarv um veðurlagið millum ídnaðarlondini og menningarlondini. Millum annað er avtalað, at ein tillagingargrunnur, sum ST umsitur, skal veita menningarlondunum endurgjald fyri tað, sum tey kunnu missa av ásetingunum í einari nýggjari veðurlagsavtalu. Heimsbankin hevur roknað út, at tillagingar fyri at forða veðurlagsbroytingum fara at kosta upp í 200 mia. krónur um árið, meðan ein meting hjá ST sigur, at tað kanska fer at kosta upp í 430 mia. krónur árliga.

Londini á Bali vóru á einum máli um, at okkurt má gerast fyri at tálma teirri stóru skógarbrenningini, har júst vertslandið Indonesia eigur bróðurpartin. Útrokningar vísa, at umleið 20 prosent av heimsins CO2-útláti stavar frá skógarbrenning, og tey seinastu árini eru fleiri átøk framd fyri at tálma skógarbrenning í londum sum Indonesia og Kongo. Har kunnu jarðareigarar nú fáa pening frá tí almenna, um teir gevast við at brenna skógarøki.

Ein týðandi táttur í semjuni á Bali er, at ídnaðarlondini hava játtað at lata menningarlondunum framkomna tøkni, so tey kunnu tálma CO2-útlátinum. Samstundis hava menningarlondini góðtikið, at ein partur av menningarhjálpini verður brúktur til slíka tøkni.

At enda samdust londini um at finna ein veg at fíggja átøkini, sum menningarlondini skulu seta í verk fyri at tálma veðurlagsbroytingunum. Tað er greitt, at londini megna ikki uppgávuna uttan stuðul, og tí noyðast ídnaðarlondini at rinda ein stóran part av hesum átøkum. Men tað eru tey til reiðar til.

# Tað søgdu tey um semjuna:



*Jens Stoltenberg, norskur forsætisráðharri: -Eg havi góðar vónir, tí tað eru so nógv lond, sum eru samd um, at vit mugu skerja útlátið. Eg haldi og vóni, at heimsins leiðarar hava skilt álvaran í, hvussu vandamikið vakstrarhúsárinið er.*



*Connie Hedegaard, danskur umhvørvisráðharri; -Sama hvussu vit venda og snara tí, so verður leiðin á mál trupul. Men tað, sum øll londini hava skrivað undir upp á í dag, kann ikki takast aftur.*



*Ban Ki-Moon, ST-aðalskrivari: -Eg eri sera takksamur fyri, at so nógv lond veruliga vístu, at tey kunnu laga seg eftir hvør øðrum, og at tey vístu vilja til eina neyðsemju.*



*Paula Dobriansky, amerikanskur samráðingarleiðari: -Nú hava vit avgjørt, hvat skal gerast, og vit hava úr at gera. Vit gingu við til at taka undir við neyðsemjuni, tá vit skiltu á londum sum Suðurafrika og Brasil, at tey veruliga ætla sær at gera nakað.*



*Þórunn Sveinbjarnardóttir, íslendskur umhvørvisráðharri: -Hetta er ein søgulig semja. Heimsins lond eru samd um at leggja fjølbroytnið til viks og at seta sær tað sum felags mál at forða veðurlagsbroytingum.*



*Rasmus Hansson, aðalskrivari í WWF: -Hóast vit ikki fingu tað úrslitið, sum vit ætlaðu, so er tað eitt stórt framstig, at heimurin er samdur um at fáa eina nýggja veðurlagsavtalu. Tí tað er fyritreytin fyri, at heimurin kann loysa trupulleikarnar, og nú er kósin sett.*